**AGANEVNDIN**

**KÆRA 5/2015**

| *FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: B36 kærir MB fyri at nýta ólógligan leikara** | |
| Deild: 2. deild kvinnur | Kapping: Landskappingin |
| Brot framt: 19.06.2015 | Aganevndin móttikið kæru: 1. juli 2015 |
| Kærugjald goldið: ja | Kærufreist hildin: ja |
| Partshoyring við 3 daga freist: ja | Starvsnevndin biðin um ummæli: ja |
| | Áheitan um munnliga viðgerð: nei |

# AGANEVNDIN

Í viðgerðini av málinum í Aganevndini hava hesir limir luttikið: Ingunn Eiriksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna, Anni á Hædd, løgfrøðingur og næstforkvinna og Sissal Kj. Kristiansen, ráðgevi.

## 1. Úrskurður

Grein 8 í Agareglugerð FSF's heimilar Aganevndini at geva feløgum og persónum sekt fyri brot á lógarverk FSF's. Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's og ta skipan, sum er gjørd fyri brúk av spælarum.

Við heimild í grein 8, litra h í Agareglugerðini verður MB 2. deild kvinnur dømt at tapa dystin móti B36 tann 19. juni 2015 fyri brúk av ólógligum leikara við málmuninum 0-3 sambært grein § 41 í kappingarreglunum fyri fótbólt.

## 2. Kærupástandir, partshoyringarsvar og møguligar viðmerkingar frá Starvsnevnd FSF's

B36 hevur kært MB fyri at nýta ólógligan leikara í dysti millum B36 og MB tann 19. juni 2015 í 2. deild hjá kvinnum.

Í kæruni vísir B36 á, at MB hevur nýtt ein ólógligan leikara, av tí at Laila Joen-Jacobsen leikti við MB nevnda dyst, hóast leikaraloyvi hjá henni er skrásett í AB.

Skrivið frá B36 hevur verið sent til hoyringar hjá MB, men onki svar er móttikið innan ásettu freistina.

## 3. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið

Sambært grein 2, sbr. grein 5, stk. 3 og 5, sbr. grein 7, stk. 2 kann Aganevndin viðgera mál um møgulig brot á lógarverk FSF's. Sambært grein 5, stk. 3 í Agareglugerðini kann Kappingarnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina viðgera eitt mál sum kemur til hennara kunnleika. Sambært grein 7, stk. 2 í Agareglugerðini kann Starvsnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina um at viðgera eitt mál sum kærumál samsvarandi reglugerðini.

## 4. Fakta í málinum

Tann 19. juni 2015 varð dystur leiktur millum B36 og MB í 2. deild hjá kvinnum.

Laila Joen-Jacobsen leikti fyri MB í omanfyrinevnda dysti.

Sambært upplýsingum frá FSF umsitingini, er leikarin Laila Joen-Jacobsen skrásett sum leikari hjá AB, og var hon tískil ikki lógligur leikari hjá MB í dystinum tann 19. juni. 2015.

**5. Lógarverkið**

Sambært grein 15, stk. 3 í Kappingarreglunum fyri Fótbólt er leikari lógligur, tá hann er skrásettur í leikaraskráseting FSF' ella tá loyvisbræv er útskrivað.

**6. Staðfestingar, metingar, o.t.**

Aganevndin kann staðfesta, at regluverkið er greitt innan hetta øki sbr. grein 15, stk. 3 í Kappingarreglunum fyri Fótbólt er leikari lógligur, tá hann er skrásettur í leikaraskráseting FSF' ella tá loyvisbræv er útskrivað.

FSF skrivstovan upplýsir fyri Aganevndini, at leikarin Laila Joen-Jacobsen er skrásett sum leikari hjá AB, og tískil var hon ikki lógligur leikari hjá MB í umrødda dysti.

**7. Niðurstøða**

Leikarin Laila Joen-Jacobsen leikti ólógliga í dystinum millum B36 og MB tann 19. juni 2015 í 2. deild hjá kvinnum sbrt. grein 15, stk. 3 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.

Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's. Fordømi eru um, at brúk av ólógligum leikara verður sektað við, at felagið verður dømt at tapa dystin.
Aganevndin metir, at síggjast kann ikki burtur frá slíkum fordømum.

**8. Úrskurður**

Grein 8 í Agareglugerð FSF's heimilar Aganevndini at geva feløgum og persónum sekt fyri brot á lógarverk FSF's. Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's og ta skipan, sum er gjørd fyri brúk av spælarum.

Við heimild í grein 8, litra h í Agareglugerðini verður MB 2. deild menn kvinnur dømt at tapa dystin móti B36 tann 19. juni 2015 fyri brúk av ólógligum leikara við málmuninum 0-3 sambært grein § 41 í kappingarreglunum fyri fótbólt.

**9. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.**

Sambært grein 12, litra f í Agareglugerðini, kann avgerðin kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar aftaná móttøku av úrskurðinum.

**10. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:**

**Tórshavn 2. juli 2015**

Ingunn Ó. Eiriksdóttir, forkvinna